Ferðafólk nummar 100.000 við nýggju Norrönu

Meira enn 100.000 ferðafólk hava siglt við Norrönu, síðani skipið fór í rutusigling 10. apríl. Ferðafólk nummar 100.000, Hervør Joensen, úr Kollafirði, fór um borð í Hanstholm í gjárkvøldið, saman við fimm øðrum ferðandi, sum vóru á ferðaseðli hennara. Tey vóru m.a. fagnaði við blómum og fingu eina mini-cruise í part til Noregs

TÍÐINDASKRIV
Smyril Line

Nýggja Norröna hevur longu nú flutt fleiri enn 100.000 ferðafólk

Í gjárkvøldið kundi Smyril Line staðfesta, at ferðafólk nummar 100.000 kom um borð á Norrönu. Tað var Hervør Joensen úr Kollafirði og fimm ferðafelagar hennara, sum fóru um borð í Hanstholm á veg til Føroyar.

Skiparin, Henrik Hammer, Danny Christensen, hotelstjóri umborð, , Allan Streymoy, móttøkuleiðari og Aage Bruun, stjóri Smyril Line Danmark, tóku ímóti teimum seks ferðafólkunum við blómutyssum og gávum, og skiparin handaði teimum eitt gávubræv á eina mini-cruise í part til Bergens.

Á kømrunum varð borðreitt við frukt, góðgæti og leskidrykkjum, og í kvøld hevur Smyril Line boðið ferðalagnum hjá ferðafólki nummar 100.000 at eta í Norröna Buffet.

Umframt Hervør Joensen eru Joan Joensen, Kitty Madsen og børnini Dóra Joensen, Jensia Joensen og Vivian Madsen í ferðalagongdina, síðani Smyril Line yvirtók Norrönu frá Flender Werft í Lübeck 7. apríl í ár og setti skipið í regluliga rutusigling 10. apríl.

– Nógv hava sjálvandi hug at royna nýggja skipið, men hetta er ikki bara nýfikni. Talan er um veruliga framgongd, tá vit longu nú flyta ferðafólk nummar 100.000 við nýggja skipinum og samstundis hava í huga, at gamla Norröna flutti 87.000 ferðafólk alt árið í fjør, sigur Óli Hammer, sum vísir á, at síðani 10. apríl hava í miðal 735 ferðafólk verið umborð á Norrönu um dagin.

Á ferðini hesaferð úr Hanstholm til Tórshavn eru umleið 1.000 ferðafólk og 300 bilar.

Óheppið at kroysta eina skipan niður yvir arbeiðsmarknaðin

– Eitt, sum er í uppskotinum hjá Bjarna Djurholm, er, at limirnir í fakfeløgum skulu hava rætt at atkvøða um semingsuppskot á frumatkvøðu og tað ljóðar ikki so galið, heldur Lisbeth Petersen, forkvinna sambandsfloksins

– Men koma vit ongan veg í samráð við partarnir á arbeiðsmarknaðinum, er sambandsflokkurin ivasamir um, hvat kann gerast

ARBEIÐSMARKNAÐUR
Áki Bertholdsen

– Tað er óheppið at kroysta eina nýggja skipan niðuryvir partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sum teir ikki taka undir við.

Tað heldur Lisbeth Petersen, forkvinna í sambandsflokkinum um uppskotið hjá Bjarna Djurholm at gera eina nýggja skipan fyri arbeiðsmarknaðin.

Eisini sambandsflokkurin er í andstøðu og vit hava spurt Lisbeth Petersen, hvørja støðu, flokkurin hevur til uppskotið hjá landsstýrismanninum í vinnumálum.

Hon sigur, at flokkurin er ikki liðugur at viðgera tað og tí er tað avmarkað, hvat hon fær sagt.

Men henni dámar lítið, at ein nýggj skipan verður sett í verk, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki taka undir við.

– Men tað er eisini ein spurningur, hvat vit gera, vísir tað seg, at tað ikki ber til at koma nakran veg við samráðingum við partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Tað átti kortini at borið til at komið á mál við samráðingum, heldur hon.

Og tað er í hvussu so er eitt í uppskotinum hjá Bjarna Djurholm, sum hon heldur ikki er so galið og tað er, at limirnir í fakfeløgunum skulu hava rætt til at atkvøða um semingsuppskot á frumatkvøðu.

Kortini heldur sambandsflokkurin, at uppskotið frá Bjarna Djurholm er ikki nóg gott og tí eiga broytingar at verða gjørdar. Men av tí, at flokkurin ikki er liðugur at viðgera uppskotið, vil hon ikki viðgerða smálutir í tí.

– Vit ætla eisini at kanna eftir, hvat liggur í uppskotunum, sum áður hava verið frammi um tað sama fyri at vita, hvat tað er, sum fakfeløgini ikki vilja góðtaka og at samanbera tað við tað, sum nú liggur frammi, sigur hon.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

Mortan Joensen, Argir
fyrrverandi sýnsmaður

andaðist leygardagin 23. august, 77 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Argja kirkju
mikudagin 27. august kl. 13.

Familjunnar vegna
Marita, Hans Pauli og Dan

Tey, ið vilja sýna samkenslu, kunnu lata eina peningagávu til Føroysku Sjómansmissiónina

Nýggj donsk skaldsøga fer fram í Føroyum

»Når engle spiller Mozart!« er ein skaldsøga um eina kvinnu, sum eftir mong ár, á vitjan aftur til Føroyar hittir tann, sum hon elskaði sum ung. Í leiktjøldunum hoyrist fullveldiskjakið.

Skaldsøgan er um 44 ára gomlu Lisu Bjørn Nielsen, stjórnmálafrøðing, sum í februar 2000 kemur til Havnar at røða á fullveldisráðstevnuni í Norðurlandahúsinum. Á ferðini til Føroyar hittir hon eina fortíð og ein ungdómskærleika, sum hon trúði, at hon fyri langari tíð síðani hevði lagt aftur um seg.

Sum dóttir ríkisumboðsmannsins gekk hon í 3.G á Føroya Studentaskúla í 1974. Nú kemur hon aftur, sum búgvin karrierukvinna. Men ferðin fær eina heilt aðra gongd enn hon hevði væntað. Hesi trý samdøgrini hon er í Havn fær ikki bert tann politiska processin eitt álvarsamt skot fyri bógvin, eisini hennara egna sinni verður skakað, tá hon knappliga stendur andlit til andlits við ein longsul og trá og møtir skuggum úr egnari fortíð, sum noyða hana at endurskoða alt sítt lív.

»Når engle spiller Mozart« er ein skaldsøga um eina modernaða kvinnu, sum leitar eftir samanhangi og meining í einum fløktum heimi. Um at velja og at velja burturfrá í lívinum, um kærleika, tónleik og politik. Tað er eisini ein søga um tað norðurlendska. Um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark fyrr og nú, og um veg føroyinga móti sjálvstýri.

Um rithøvundin

Lisbeth Nebelong er fødd í 1955. Hon er útbúgvin tíðindakvinna og Master of Public Management, MPM. Árini 1965 til 1967 búði hon í Havn og gekk í Skt. Frans Skúla. Seinni frá 1973-1974 kom hon aftur og arbeiddi sum vikarur í Nonnuskúlanum.

Sum fjølmiðlakvinna hevur Lisbeth Nebelong verið á frásøguferð í Føroyum í 1980, 1985 og í 1989. Í 2000 skrivaði hon eina ritgerð um fullveldisgongdina í Føroyum.

Í dag er hon samskiftisráðgevi og rithøvundur. Millum annað heldur hon skeið um »At fáa boðskapin fram« fyri Løgmansskrivstovuna.

Seinastu tíggju árini hevur hon skrivað bøkur um privatøkonomi hjá fólki, tann nýggjasta er Sund økonomi, sum kom út í 2000. Når engle spiller Mozart er hennara fyrsta skaldøsga.

»Når engle spiller Mozart« kemur út tann 26. august.

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

ú hbvmfp qfi A^k j ^oh^o '

Sfß J ^boph >fo ?lkrp ph^iq qĜ _boq cboß^pq 2 cboßfo Ĝo Sćdrj) cvof ^q cć^ bfk Ėhbvmfp cboß^pbßfi qfi A^k j ^oh^o bii^ lhhroq ^kk^ß ćerd^sboq cboß^ j ći) ć orqrkbqfkr j egć J ^boph >fo

J ^boph >fo ?lkrp
Sfq dbs^ q Í o j bfo^

'Cboß^^sdgĐia bor fhhf đolhk^ßf) pboifd^o obdiro bor d^ia^kaf÷ J fkkfpq qfi J ^boph >fo ?lkrphloq) k Í pqr cboß qvdr j cboß^pq ld p^ j i^ pqfd qfi kĖds^o ćerd^sboa^o rmmifsfkd^o) elqbidfpqfkd^o ld «ldcboß^pbßi^o÷

MAERSK AIR
It's got to be perfect

TELEVARPIÐ BJÓÐAR ...

Televarpsmóttakara
fyri einans 1.695,-
spar 500,-

Tilboðið er galdandi, tá tú teknar televarpshald (frá 29. aug. - 14. sept. 2003)

Veitst tú at:
· tilboðið gevur tær **ókeypis** Televarp í september 2003
· tú fært **bíligastu** kortleiguna
· tú fært digitalt signal, sum gevur tær **bestu góðskuna**
· við Televarpinum er tað **lættari** at stovna, broyta og strika hald

28 fjølbroyttar rásir til alla familjuna
t.d. TV3, 3+ & Viasat Sport

Fylg við í fyrstu sendingini Gospel 2003 á Rás1 í september

Ring á 340 340 og spyr um sølustøð ella vitja **www.televarp.fo**